*– Hetta er ótrúligt. Eg vóni, at onnur fáa sama møguleika sum eg*

*Christer Fuglesang*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK






# Heilsaði á svenskum uttan úr rúmdini

**- Eg vóni, at onnur fáa sama møguleika sum eg, segði svenski rúmdarmaðurin Christer Fuglesang aftan á sína fyrstu ferð uttan fyri rúmdarferjuna**

Sutt fyri klokkan tíggju í gjárkvøldið fóru Christer Fuglesang og Robert Curbeam úr rúmdarferjuni Discovery, og teir næstu seks tímarnar og 36 minuttirnar arbeiddu teir báðir uttan fyri ferjuna og altjóða rúmdarstøðina ISS.

Sjónvarpsmyndir frá rúmdarumsitingini NASA vístu, hvussu teir báðir festu ein stóran lut uttan á rúmdarstøðina. Stundum vóru teir heilar 60 metrar frá lúkuni á Discovery. Heilt leysir vóru teir ikki, tí ein trygdarlína var millum teir og Discovery.

Discovery fleyg við 28.000 kilometra ferð um tíman, og hon brúkti sostatt umleið hálvan annan tíma til eina rundferð um Jørðina. Tað bar í sær, at tað var fleiri ferðir dagur og nátt, meðan teir báðir rúmdarmenninir vóru uttanfyri.

Stutt fyri8 klokkan trý í nátt vóru Christer Fuglesang og Robert Curbeam lidnir við arbeiðið. Tá hann fór innaftur, sendi Fuglesang eina heilsan niður á Jørðina á svenskum:

- Teir seinastu fýra dagarnir hava verið heilt ótrúligir. Eg vóni, at onnur fara at gera sum eg. Kanska verða tey við til at byggja eina mánastøð, segði tann 49 ára gamli sviin, sum skal úr Discovery eina ferð afturat til arbeiðis í rúmdini.

# Her liggur Paulus grivin

Fornfrøðingar eru komnir fram á ein gravstað, har teir vænta at finna leivdirnar av Paulusi apostli.

Eftir áheitan frá Vatikaninum hava fornfrøðingarnir gjørt ymsar rannsóknir undir Pauluskirkjuni í Rom, og har eru teir komnir fram á ein gravstað, sum teir siga vera eldri enn frá árinum 390.

Søgufólk hava leingi havt varhugan av, at ein gravstaður var undir altarinum í kirkjuni. Nú hava fornfrøðingarnir flutt teir stóru marmorsteinarnar undir altarinum, og har komu teir fram á gravstaðin. Uttaná standa orðini ”Paulo Apostolo Mart”. Tað er latín og merkir ”Paulus Apostul Pínslarváttur”.

Paulus, sum var ein av apostlum Jesusar, var føddur millum ár 5 og 10 fyri Kristi føðing, og søgan sigur, at hann bleiv tikin av døgum í árinum 65, tá Neru var keisari í Rom.

Sambært BBC ætlar Vatikanið at lata almenningin sleppa at síggja gravstaðin hjá Paulusi, men enn er støða ikki tikin til, um gravstaðurin skal latast upp og kannast nærri.



## STUTT SAGT

### Sekur í fólkamorði

Ein dómstólur í Etiopia hevur dømt landsins fyrrverandi forseta og einaræðisharra Mengitsu Haile Marian sekan í fólkamorði, og sambært etiopiskari lóg kann hann fáa deyðarevsing. Mengitsu møtti ikki sjálvur í rættinum. Hann býr í Zimbabwe, og stjórnin har hevur sýtt fyri at útflýggja hann. Tvørturímóti býr Mengitsu í einum marglætishúsum, sum zimbabwiska stjórnin hevur latið honum. Mengitsu Haile Marian tók valdið í Etiopa í 1974, og hann stýrdi landinum við harðari hond líka til 1991, tá hann bleiv koyrdur frá. Meiri enn 70 av hansara gomlu medarbeiðarum eru eisini drignir fyri rættin.

### Vænta 25 metra aldu

Norsku veðurmenninir hava boðað frá illveðri fram við strondini í Møre og Trøndelag hóskvøldið. Veðurstovnurin Storm Wether Center sigur í sínari forsøgn, at vindferðin kann koma upp í 40 metrar um sekundið, og at aldan kann koma upp í 25 metra hædd. Norska veðurstovan væntar kortini ikki, at tað verður so ringt. Veðurmaðurin Jørgen Grønneberg sigur við Aftenposten, at hann vænar einar 30 metrar um sekundið og millum 12 og 14 metrar høga aldu, men at nakrar kunnu verða uppaftur størri.

### Blind kunnu veiða

Í amerikanska statinum Texas hevur ein republikanskur politikari skotið upp, at blind fólk skulu fáa loyvi at fara á veiðiferð við byrsu. Hann sigur, at tey blindu skulu hava ein ljóskastara á høvdinum. Ljósið skal fáa djórini at standa still, og so skal ein vegleiðari siga tí blinda, hvar djórið er. Ætlandi skal uppskotið viðgerast eftir nýggjár.